# Vantandi vestur kostar bót

Drekin skrivar á heimasíðu sínari, at Vaktar- og Bjargingartænasta nú hevur heimild til at skriva út bót, um komið verður fram á kappróðrarbátar, har manningin ikki nýtir bjargingarvest. Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, hevur sett í gildi lógina, sum áleggur rógvara uttan vest at gjalda bót á 1.000 kr. Bótin er persónlig, og eigur tí ikki at gjaldast av felagnum. Um neyðugt kann rógvari pantast, um bótin ikki verður goldin.



# Finaludagur leygardagin

Steypafinalurnar í yngru deildum verða spældar á niðara vølli í Gundadali nú leygardagin. Fyrsti dysturin er klokkan 10, tá smágentur hjá HB og KÍ dystast um Niels L. Arge steypið. Klokkan 12 spæla smádreingirnir hjá NSÍ og VB/TB um Cadbury steypið. Í gentudeildini er finalan millum KÍ og B68/NSÍ, og byrjar tær klokkan 14. Seinasta finalan verður klokkan 16, tá dreingjaliðini hjá HB og B36 spæla um blaðberarasteypið. Annan mikudag er unglingafinalan á skránni, og annan leygardag spæla bestu kvinnu- og mansliðini sínar finalur.

# Cannavaro ikki við til EM




*Tað kemur illa við hjá Italia, at liðskiparin og sterki verjuskansin neyvan verður partur av EM-hópinum*

*Mynd: Polfoto/AP*

**Miðverjuskansin hjá italsku heimsmeistarunum er fekk skaða undir venjing, og verður ikki at síggja í EM-endaspælinum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

Tað leyp stórur hvøkkur á italska EM-hópin, tá ið Fabio Cannavaro undir venjing í gjár meiddi seg so illa, at hann mátti berast av vøllinum. Miðverjuskansin úr Real Madrid brast saman við Giorgio Chiellini, og fyribils kanningar vísa, at ein liður í fótinum er somikið illa skaddur, at ein skurðviðgerð møguliga verður neyðug.

Uttan iva ein dyggur smeitur fyri italska venjaran, Roberto Donadoni, sum nú hevur sent boð eftir Alessandro Gamberini úr Fiorentina.

Italia spælir sín fyrsta dyst í ársins EM-endaspæli mánadagin í komandi viku, tá ið teir kl.19.45 møta Hollandi.

# Hickersberger trýr upp á møguleikan

**Josef Hickersberger er ivaleysur í, at Eysturríki kemur í EM-fjórðingsfinaluna**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*hersim@sosialurin.fo*

Venjarin hjá Eysturríkska fótbóltslandsliðnum hevur meldað hart út áðrenn EM-endaspælið í Sveis og Eysturríki, sum byrjar nú leygardagin.

- Vit hava sett okkum eitt stórt mál, vit ætla at koma í fjórðingsfinaluna. Eg eri vorðin nógv meira bjartskygdur. Okkum nýtist ikki at fara til eina veddingarfyritøku fyri at finna út av, at Týskland, Kroatia og Pólland eru favorittar til at vinna á okkum, men vit hava heimavallar-fyrimunin, og tað gevur okkum ein góðan møguleika at vinna stig." Eysturríki, sum er nr. 101 á FIFA-styrkislistanum er á pappírinum tað klárt veikasta liðið, sum tekur lut í EM-endaspælinum, so evropeiskir fótbóltsserfrøðingar eru ikki samdir við Josef Hickersberger.



*Hjá kvinnunum var Sílið fyrsti báturin á málið. Á myndini síggjast Sílið og Frúgvin kappast um odasessin. Teistin er báturin, sum fremst í myndini*

# Styrkisroynd á Strondum

**Í alt tóku 36 bátsmanningar – harav 8 barnamanningar – lut í kappróðrinum á várfagnaðinum á Strondum leygardagin**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hjá fleiri bátum var stevnan á Strondum seinasta styrkisroyndin undan norðoyastevnuni, sum verður í Klaksvík um vikuskiftið.

Og tó at talan fyri tað nógva var um javnar róðrar, so vóru í nøkrum greiðar ábendingar um, hvør báturin er tann, sum skal takast, um nøkur vón skal verða um gull á nakrari stevnu. Soleiðis hevði Havfrúgvin mest sum framsýningarróður í dreingjaróðrinum, har munurin aftur til næsta báturin var heili 10 sekund.

Tað er ein munur, sum verður sera trupul at taka aftur hjá hinum bátunum longu á norðoyastevnu, men í øðrum bátastøddum er kappingin millum fremstu manningarnar sera hørð. Ikki minst hjá 6-mannaførum við monnum, har Sundabáturin, Tvørabáturin og Riddarin allir tykjast vera væl fyri.

Stóri spurningurin í ár hevur verið, hvussu lagna verður hjá 10-mannaførunum. Til FM-stevnurnar er áhugin nú kortini somikið stórur, at talan verður um kappróður, men á Strondum var eingin 10-mannafarsróður. Ogheldur ikki var nakar róður hjá 6-mannaførum við kvinnum. Ein bátastødd, har luttøkan hevur verið lítil seinnu árini, og har Jarnbardur hevur verið í flokki fyri seg.



*Talan var um sera spennandi 6-mannafarsróður hjá monnum. Sundabáturin átti tó munin framman fyri Tvørabátin og*

**Úrslitini**

| Nr. | Bátur | Tíð |
|---|---|---|
| **5-mannafør dreingir** | | |
| 1 | Havfrúgvin | 05:18,06 |
| 2 | Tjaldrið | 05:28,19 |
| 3 | Teistin | 05:31,19 |
| 4 | Katla | 05:33,07 |
| 5 | Blikur | 05:33,17 |
| 6 | Strípan | 05:36,16 |
| **5-mannafør gentur** | | |
| 1 | Drekin | 05:35,21 |
| 2 | Junkarin | 05:38,12 |
| 3 | Blikur | 05:41,20 |
| 4 | Jallurin | 05:45,19 |
| 5 | Firvaldur | 05:50,04 |
| **5-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 | Sílið | 05:31,24 |
| 2 | Frúgvin | 05:33,24 |
| 3 | Báran | 05:38,13 |
| 4 | Erla Kongsdóttir | 05:42,19 |
| 5 | Teistin | 05:46,13 |
| 6 | Katla | 05:48,00 |
| 7 | Ritan | 05:49,19 |
| 8 | Havfrúgvin | 05:59,18 |
| **5-mannafør, dreingir (barnaróður)** | | |
| 1 | Teistin | 02:40,21 |
| 2 | Jallurin | 02:46,10 |
| 3 | Blikur | 02:51,09 |
| **6-mannafør, menn** | | |
| 1 | Sundabáturin | 07:48,11 |
| 2 | Tvørabáturin | 07:49,09 |
| 3 | Riddarin | 07:52,01 |
| 4 | Gongurólvur | 08:01,12 |
| 5 | Lómur | 08:03,04 |
| 6 | Rádni | 08:10,08 |
| **5-mannafør, gentur (barnaróður)** | | |
| 1 | Ørnin | 02:39,13 |
| 2 | Frúgvin | 02:43,12 |
| 3 | Tjaldrið | 02:49,14 |
| 4 | Teistin | 02:49,17 |
| 5 | Títlingur | 02:53,22 |
| **8-mannafør** | | |
| 1 | Heiðabáturin | 07:16,20 |
| 2 | Argjabáturin | 07:20,05 |
| 3 | Knørrur | 07:28,04 |